LØGTINGIÐ

**Móttøka fyri løgtingsformanninum**

**Løgtingsformaðurin**

22.04.2026

Fyrst og fremst vil eg siga eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum eru komin her í dag.
Samstundis vil eg eisini veita eina stóra tøkk til løgtingsstjóran og umsitingina, fyri at skipa fyri hesi móttøkuni.

Tað er mær ein sannur heiður, at fáa tað litið mær upp í hendi, at gerast løgtingsformaður.

Eg eri tilvitaður um ta stóru ábyrgd, eg standi við sum løgtingsformaður, og fari at gera mítt ítasta, at liva upp til ábyrgdina og tignina, ið hetta krevur.

Síðsta tingskeiðið sat eg í formansskapinum, sum 2. næstformaður. Arbeiðsstevið hjá undanfarna formansskapi var ómetaliga gott. Gamaní vóru vit ikki altíð á einum máli um tey ymisku viðurskiftini, ið vórðu viðgjørd. Tó var tað eitt uppbyggjandi samstarv. Tað skal verða mín vón, at vit í nýggja formansskapinum kunnu halda fram við sama stevi.

Formansskapurin er hitt hægra fyriskipaða stýrið í Løgtinginum. Formansskapurin umboðar samstundis eisini tingið úteftir. Tí hevur tað eitt nú alstóran týdning, at tað eru júst vit, ið vísa vegin, tá viðvíkur tign á hesum tingi.

Saman við mær í formansskapinum er Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, 1. næstforkvinna, Hervør Pálsdóttir 2. næstforkvinna og Jóhannis Joensen, 3. næstformaður. Formansskapurin hevur longu havt sín

fyrsta fund og sett orð á nakrar av ætlanunum, sum liggja fyri framman hjá Formansskapinum. Uttan at koma nærri inn á tær kann eg tó nevna eitt. Tí um eitt ár, í 2027, eru 175 ár síðan Løgtingið varð endurreist. Hetta er nakað, sum vit sjálvsagt fara at varpa ljós á og markera.

Eitt er okkara stolta søga, við einum parlamenti, ið telist ímillum heimsins elstu. Tingsøga okkara gongur minst 1000 ár aftur í tíðina. Eitt annað er tíðin, sum vit liva í í dag. Tað hevur kanska sjáldan í nýggjari tíð, havt størri týdning enn júst í hesum, stundum ófrættakendu tíðum, júst at hátíðarhalda fólkaræðið.

Góðu gestir,

Vanligt hevur verið at sætið, sum løgtingsformaður ella løgtingsforkvinna, hevur verið tað síðsta á politikkaraleiðini. Og ja. Eg eri í holt við síðsta kapittulin á míni politikkaraleið. Men, tað er her tað veruliga fer at henda nakað, og vónandi komi eg at leggja nakað eftir meg. Tit, sum kenna meg, vita í øllum førum, at eg fari ikki at liggja á lavrberjabløðunum og hvíla hesa tingsetuna.

Góðu gestir,

Vit byggja øll á herðarnar á teimum, ið undan okkum vóru. Nakað, sum vit kanska hava gott av at minna okkum sjálvi, og hvønn annan á, viðhvørt. Undan mær, sum løgtingsformaður ella løgtingsforkvinna hava verið mætar kvinnur og menn, sum á hvør sín hátt hava verið við til at flyta nakað, og ikki minst borið sessin við virðing og tign. Marita Petersen var fyrsta kvinnan, sum gjørdist, tá løgtingsformaður. Jógvan Ingvard Olsen tók síðan við í 1996. Finnbogi Ísakson í 1998, Edmund Joensen í 2002, Hergeir Nielsen í 2008, Jógvan á Lakjuni í 2011, Páll á Reynatúgvu í 2015 og síðan Jógvan á Lakjuni aftur í 2019. Undan mær hevur løgtingsforkvinnan verið Bjørt Samuelsen frá 2022.

Tað er mær tí ein so ómetaliga stórur heiður, sum tann níggjundi í røðini, at vera løgtingsformaður.

Góðu gestir,

Hurðin til løgtingsformannin er altíð opin, fyri bæði tingfólki og øðrum.
Mítt ynski er at røkja hetta starvið við tí tign og álvarsemi, ið krevst. Samstundis, sum eg fari at leggja stóran dent á at gera tað, sum krevst, skulu vit fylgja bæði nútíðini og framtíðini.
Eg vil her til endans eisini, veita eina serstaka tøkk til konu mína og familjuna, sum trúføst hava staðið og enn standa við mína lið.
Uttan tykkum formáddi eg mær lítið.

Guð signið okkum øll,
Takk fyri!

Johan Dahl,
løgtingsformaður